# Skála skal til Finnlands

**Enn er tað kortini ikki greitt hvørjum felag Skála, sum fer at royna seg í Europa fyri fyrstu ferð, skal spæla ímóti**

INTERTOTO
*Jóannes Hansen*

11. apríl varð lutur kastaður á høvuðsskrivstovuni hjá UEFA í Nyon í Sveis um, hvussu liðini skulu hittast í fyrsta umfarinum í Intertoto Cup.

Føroyar verða umboðaðar av Skála í hesi kappingini. Fyrsta umfarið verður 18./19. og 25./26. juni, og eftir lutakastið er tað greitt, at Skála í fyrsta umfarinum skal spæla ímóti einum finskum felag. Enn er kortini ikki greitt, hvat fyri felagi skálamenn skulu spæla ímóti. Sambært lutakastinum fer Skála at eiga heimavøll í fyrra dystinum.

Skála hevur ongantíð áður roynt seg í altjóða fótbólti. At teir í ár eiga tann rættin kemst av, at góðu avrikini í fjør bóru triðja plássið í landskappingini við sær.

Sambært kappingarskipanini eru tveir landskappingardystir hjá Skála fluttir til mikudagar orsaka av Intertoto Cup kappingini. Í trettanda umfarinum skal Skála mikudagin 15. juni spæla á heimavølli ímóti KÍ, og í 14. umfarinum skal Skála mikudagin 22. juni spæla á útivølli ímóti HB. Tað vil við øðrum orðum siga, at hjá skálamonnum fara stórar avbjóðingar at standa á skránni 15. juni, 18. juni, 22. juni, 25. juni og so aftur 3. juli, tá ið teir í fimtanda umfarinum skulu spæla landskappingardyst á heimavølli ímóti NSÍ.

Um tað fer at eydnast Skála at basa finska mótstøðuliðnum í Intertoto Cup, so bíðar belgiskt felag í næsta umfarinum. Uppgerðirnar ímóti teimum eru settar at vera 2/3. juli og 9./10. juli.

61 feløg úr 44 av teimum 52 UEFA limalondunum fara at luttaka í Intertoto kappingini. Trý tey bestu teirra fara at fáa rætt at spæla í UEFA kappingini í heyst.



*Skála hevur ongantíð áður roynt seg í altjóða fótboltshøpi*

**SUNSET KAPPINGIN**

KVINNUR

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 11 | 11 - 0 - 0 | 837 | 482 | 355 | 35 |
| 2 Stjørnan | 12 | 11 - 0 - 1 | 785 | 488 | 297 | 35 |
| 3 Neistin | 13 | 10 - 0 - 3 | 776 | 563 | 213 | 30 |
| 4 Søljan | 12 | 6 - 0 - 6 | 694 | 605 | 89 | 20 |
| 5 VÍF | 12 | 5 - 0 - 7 | 596 | 611 | -15 | 15 |
| 6 StÍF | 11 | 2 - 0 - 9 | 543 | 672 | -129 | 9 |
| 7 Kyndil | 14 | 3 - 0 - 11 | 539 | 778 | -239 | 9 |
| 8 Tjaldur | 11 | 0 - 0 - 11 | 351 | 922 | -571 | 0 |

## Sosialurin og eygað

ÍF er oddalið í bestu deildini. Tað hevur sást aftur í Sosialinum eftir tvey tey síðstu vikuskiftini. Dystirnir á heimavølli ímóti GÍ og á útivølli ímóti Skála hava fingið meiri umrøðu enn nakar annar dystur. Talan er um nýggjar tíðir í Fuglafirði, og Sosialurin er við uppá tað.

Ein partur av upptaktini undan dystinum á Skála snúði seg um, at Bartal Eliasen ikki fór at vera á ÍF liðnum, tí hann skuldi uttanlands. Tað segði ÍF venjarin fyri Vikuskiftis Sosialinum.

Sunnudagin var Bartal Eliasen millum teir mest eyðsýndu á ÍF liðnum, sum spældi 3-3 á Skála. Í týsdagsútgávuni spurdu vit ÍF venjaran, um hann við útsøgnini um Bartal undan vikuskiftinum spældi Sosialinum og serliga Skála eitt puss. Skilagóði ÍF venjarin greiddi frá, hvussu hetta hekk saman, og Sosialurin bar áhugaverdu søguna.

Onkur í Fuglafirði hevur fingið ilt av hesum, og ákærir Sosialin fyri at válka sær í sjúkum barni. Sosialurin hevur í hesum førinum sligið positiva tónan ann, og tey, sum hava fingið nakað annað burturúr, kunnu hava ikki lisið greinina. At forsíðu ávísingin kanska kundi havt verið orðað eitt sindur elegantari kann kanska diskuterast.

**- blm.**

## Nýggj nevnd á Argjum

**Fróði Ó. Hansen er nýggjur formaður í Argja Róðrarfelag**

AÐALFUNDUR
*Jákup Mørk*

Tann 3. apríl hevði Argja Róðrafelag aðalfund. Millum evnini á fundinum var nevndarval, og hetta gjørdi av, at Fróði Ó. Olasen nú er formaður í felagnum. Hans J. Arge er næstformaður, Heidi Joensen er skrivari, Edvard Olsen er kassameistari og Eyðbjørn K. Mouritsen er fimti nevndarlimurin.

Árið í fjør var annars metár á Argjum. Ikki færri enn trý gull og eina bronsu vunnu teir fýra bátarnir hjá felagnum í FM-kappingini, og hetta hava tey á Argjum ongantíð roynd fyrr. Og sum bonus varð felagið eisini kosið ársins róðrarfelag á gallaveitsluni, eins og lesarar hjá Dimmalætting útnevndu felagið at hava framt ársins ítróttarbragd.

Sagt verður annars, at bátarnir hjá felagnum nú eru mannaðir, og at felagið í fer at taka lut við fimm bátsmanningum. Súlan er leigað til felagið, og hon fer at hava eina gentumanning. Harumframt verða so Blikur við tveimum manningum, Lómur og Argjabáturin við í FM-kappingini.

**-jm**

## Tung støða hjá Tromsø

Hóast teir aftur í ár eru í finaluni um norska meistaraheitið í mansflogbólti, so er fíggjarliga støðan alt enn góð í felagnum hjá Rúna Weihe, BK Tromsø.

Í fyrsta finaludystinum móti Nyborg vann Tromsø, men fíggjarligir trupulleikarnir í felagnum hava av álvara rúgvað seg upp, nú næsti finaludysturin er á skránni. Hesin skal nevnliga spælast í Bergen, og í Tromsø hava tey ikki so frægt sum ráð til ferðaseðlarnar til norska høvuðsstaðin.

Kostnaðurin fyri eina slíka ferð liggur um 30.000 kr., og hesar hevur felagið nú fingið vinnulívið í býnum at útvega.

Men hóast tungu fíggjarligu støðuna, so er stjórin í felagnum Harald Markussen bjartskygdur. Ikki minst tí felagið longu nú hevur leikarahópin til komandi kappingarár kláran. Ein hópur, sum eisini inniheldu navnið á Rúna Weihe.

**-jm**

VÍF-Kyndil 28-20(13-13):

## Nærkast endanum

Mánakvøldið spældu kvinnuliðini hjá VÍF og Kyndli ein framskundaðan dyst í Sunset-kappingini í Vestmanna. VÍF vann dystin trygt, men tað var ikki fyrr enn í seinna hálvleiki, at nakar munur var á liðunum báðum.

Fleiri av feløgunum í Sunset-kappingini hava framskundað sínar dystir fyri at stytta um kappingarárið. Til dømis hevur Kyndil nú bert tann eina dystin eftir, sum er á skránni 23. apríl.

Upprunaliga var ætlanin, at tá ið kappingin endar 30. apríl, skuldi fult umfar verða á skránni, men soleiðis verður neyvan, og allarhelst verður bert dystur millum Stjørnuna og VB tann dagin.

**tn**

**VÍF-Kyndil 28-20(13-13)**

**VÍF**: Ioana Rapa 14(2), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 5, Alis Høghamar 3, Finngerð Jensen 2, Linda Johannesen 1, Tórun Jónolvsdóttir 1, Torgunn Johansen 1, Annfríða Helgadóttir 1
**Kyndil:** Ronja Mikkelsen 9(6), Súsanna Petersen 2, Ann-Mari Wang 2, Hildur Høghamar 2, Randi Wardum 2, Linda Weihe 1, Kari-Ann Petersen 1, Lotte Sørensen 1
**Brotskøst:** VÍF 3(2), Kyndil 7(6(
**Útvísingar:** VÍF 5, Kyndil 5
**Dómarar:** Hannis og Uni Wardum
**Áskoðarar:** 31

Kyndil-Stjørnan 18-42(11-25):

## Kyndil liðugt fyri í ár

Týskvøldið var dystur í Sunset-kappingini á Hálsi millum Kyndil og Stjørnuna. Kyndilsvenjarin, Geir Wardum, boðaði fyrr í ár frá, at hann fór at gera eina roynd at framskunda dystirnar hjá sínum liði, soleiðis at kappingarárið bleiv stytt mest møguligt.

Hetta hevur eisini eydnast teimum, og dysturin móti Stjørnuni týskvøldið var eisini tann síðsti hjá Kyndli í hesum kappingarárinum.

Mótstøðan í seinasta dystinum var tó alt ov sterk fyri Kyndil, sum mátti leggja rygg til ein knúsandi ósigur. Stjørnan vann stórt 42-18.

Besti málskjútti hjá Kyndli var Ann-Mari Wang við sjey málum, og Una Olsen skeyt eisini sjey mál fyri Stjørnuna.

**-tn**

**Kyndil-Stjørnan 18-42(11-25)**

**Kyndil:** Ann-Mari Wang 7, Randi Wardum 4, Ronja Mikkelsen 2(1), Linda Weihe 1, Ása Apol 1, Súsanna Petersen 1, Kari-Ann Petersen 1, Hildur Høghamar 1
**Stjørnan:** Una Olsen 7, Anna K. Samsons 6, Katarina Stjepanov 6, Alina Olaru 6, Bára S. Klakstein 6, Annika Ljósstein 6(1), Joan M. Djordjevic 5(1)
Brotskøst: Kyndil 1(1), Stjørnan 4(2)
**Útvísingar:** Kyndil 3, Stjørnan 3
**Dómarar:** Sámal Hansen og Dánjal Samuelsen